










# Væleydnað Vármótasýning í Havnar Klubba

*Mikukvøldið byrjaði stór várumótaframsýning í Havnar Klubba, og hetta var eitt væleydnað tiltak. Hesaferð var sýningin býtt sundur í tvey kvøld. Mikukvøldið vóru átta handlar við, meðan restin slapp fram at hóskvøldið*

Heini í Skorini

Stór várumótasýning var í Havnar Klubba mikukvøldið og hóskvøldið, og hetta var eitt sera gott og væleydnað tiltak. Stúgvandi fult av fólki var, knapt 200 fólk til tað fyrra tiltakið mikukvøldið, og handlarnir lótu væl at eftir mótasýningina.

Tað eru ávísar broytingar farnar fram síðani seinasta ár, og tað tóktist at rigga sera væl. Í fjør vóru allir handlarnir sama kvøld, og sostatt var mótasýningin bert eitt kvøld, men hesaferð høvdu fyriskiparnir gjørt av, at býta tað upp í tvey kvøld. Orsøkin var hon, at tað tóktist at vera ein alt ov langlig várumótasýning í fjør, og tá tað nærkaðist endaðum, vóru fólk farin at troyttast. Men í ár var sum sagt býtt up í tvey kvøld, og hetta eydnaðist nógv betri. Mótasýningarnar vóru styttri, átta handlar mikukvøldið, og restin hóskvøldið, og av tí at tað ikki bleiv so langt, megnaðu fyriskiparnir at skapa eitt gott huglag, frá byrjan til enda. Handlarnir, sum luttóku í várumótasýningini vóru: Benetton, Drós, Fljóðið, Thomas Dam Ítróttur, Handilskjarnin - damur og harrar, hjá Kissa, Hon & Hann, Kallkyn, Línbúðin, Madam L, Mótaskálin, Seytjan, Sirri, Skálabúðin, Vogue, Wrangler, Fótbúni, Kjallarin, Boutique Romantika, Frú S, 29, Optikbúðin Skilling, Millennium, Akkuleya, Trónd Hansen, Salong Ása og Salong Viviann.







Alt tað nýggjasta innan móta var sýnt fram, frá barnaklæðum til harraklæði, frá innast til uttast. Frisørsalongirnar vístu alt tað nýggjasta innan klipping, liting og uppseting, og var tað sera spennandi at síggja. Í steðginum var møguleiki at keypa lutaseðlar, og har kundi ein, við eitt sindur av hepni, ogna sær klæðir og gávukort frá ymiskum handlum, og tað var sjálvsagt eisini við til at gera mótaframsýningina meiri spennandi. Tað var sera hugnaligt inni í hølinum har mótasýningin var, og var hetta Akkuleyu og Trónd Hansen fyri at takka, sum høvdu pyntað við alskyns vøkrum páskaprýðið. Alt í alt ein sera góð og væleydnað várumótasýning, sum var merkt av væleydnaðum broytingum, og sum uttan iva hevur verið til gleði fyri øll tey sum vóru til staðar, og sum annars hava áhugað fyri nýggjum klæðum, nýggjum hármóta, og annnars øllum tí nýggjasta innan móta sum heild.

*Myndir: Jens Kr. Vang*



